# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*– Tað er bygdasligt tvætl, at Leirvík og Gøta skulu vera alternativ til Runavík og Klaksvík.*

*Randi í Jógvanstovu*

## Dyrnar á glopp

Fundurin, sum formanskapur Norðurlandaráðsins júst hevur hildið í Føroyum, hevur sambært forseta ráðsins gloppað dyrnar fyri Føroyum til Norðurlandaráðið. Forsetin, danski fólkatingsmaðurin Ole Stavad segði í samrøðu við blaðið í gjár, at nú fyriliggur frágreiðing frá fókarættarligum serfrøðingum um støðuna hjá sjálvstýrandi londunum. Niðurstøðan tykist vera, sambært Stavad, at eingin løgfrøðilig forðing longur er fyri fullum limaskapi.

Orsøkin til hesa kúvending er, at fólkarættur tykist vera í skjótari broyting. Meðan tað fyri bert tjúgu árum síðani var so, at bindandi avtalur bert kundu gerast millum sjálvstøðug lond, so er tað nú vorðið alt meira vanligt, at sjálvstýrandi lond og ymsir felagsskapir gera bindandi avtalur við sjálvstøðugar statir. Her er tí eingin forðing longur fyri limaskapinum hjá okkum. Spurningurin er so, um vit veruliga vilja henda limaskap? Vilja vit rinda tað, ið hetta kostar? Vilja vit taka lut í øllum virkseminum av fullum huga?

Vit ivast ikki í, at føroyingar allir veruliga hava viljan til at taka lut í norðurlendskum samstarvi og rinda tað, ið hetta kostar. Her er jú nógv at vinna: stuðul til vísindi og mentan, royndir, kontaktir og netverk – alt hugtøk, sum eru neyðug fyri eina tjóð í menning og eina tjóð á veg fram ímóti alt størri sjálvræði. Vit ivast ikki í, at landsstýri, samgonga so væl sum andstøða av fullum huga nú fara at virka fyri fullum limaskapi í Norðurlandaráðnum, og øll ynskja ivaleyst, at hetta skal fara at eydnast væl.

**Sosialurin**

## Ósaklig oddagrein um stuðulsskipanina fyri brekað børn

**HANS PAULI STRØM**
landsstýrismaður



Sakligar og reiðiligar grundgevingar er minsta kravið, sum bæði lesarin og tann, ið stendur fyri skotum, eigur at kunna seta til eina oddagrein. Ikki minst tá hon fellur so harðan dóm yvir politisku myndugleikarnar, sum oddagreinin "Skammið tykkum" í Sosialinum í gjár.

Men hetta minstakravið livir oddagreinin í Sosialinum ikki upp til.

Oddagreinin umtalar broytingarnar í stuðulsskipanini fyri børn, og leggur politiska myndugleikan undir við hesum at vilja gera fíggjarligar niðurskerjingar, og tí eisini at vilja gera "eitt afturstig, sum hóttir við at reka okkara borgarar av landinum", og at vilja "lække tænastustøðið hjá børnum við serligum tørvi".

Hetta er bæði ósatt og ósakligt. Umleggingarnar við stuðulsskipanini miðja júst eftir tí øvugta: at skapa eina nýggja, fíggjarliga og fakliga sterkari skipan, sum fer at geva børnunum og teirra foreldrum eina betri tænastu á einum tryggari og hægri støði.

Hinvegin er tað rætt, at í nøkrum einstøkum førum hevur umleggingin ført til trupulleikar hjá nøkrum familjum í hesi skiftistíðini, meðan tær nýggju starvssetaninar í stuðulsskipanini fara fram. Ongin harmast hetta meira enn vit, sum varða av hesum viðurskiftunum politiskt og fyrisitingarliga. Og sum fráboðað, so vænta og vóna vit, at tað verður vunnið á hesum trupulleikum í hesum døgum, nú tær seinastu starvssetaninar verða fingnar upp á pláss.

Men hetta eru einstakir trupulleikar, og tað er ósakligt út frá hesum at skera alt yvir ein kamb og skíra allan reformin av stuðulsskipanini fyri óndan politiskan illvilja móti teimum veikastu í okkara samfelag.

Oddagreinin leggur politiska myndugleikanum undir, at hann ikki vil raðfesta hesi børn við serligum tørvi, og at hann setir tey afturum betong og asfalt, so at tað ikki verða ráð at verja hesi veikastu í samfelagnum.

Til tað er at siga, at tað neyvan er nakað annað økið, ið er raðfest við so stórum vøkstri, sum tilboðini til brekað børn og teirra familjur. Tað er henda talvan niðanfyri týðiligt prógv fyri, sum vísir at fyri bara hesi síðstu 3 árini er játtanin til brekað børn hækkað við 45%.

tilboð, sum ikki var gjørligt undir gomlu skipanini. Sum nú í komandi mánað, tá stuðulsstova fer at verða skipað í Ovarugøtu í Hoyvík, við dagtilboði til fjølbrekað børn, við tilboði um døgnumlætting, við starvsfólkum við fakligum pedagogiskum og fysiurgiskum førleika.

| Játtan til brekað børn | 2003 | 2006 | Hækking | |
|---|---|---|---|---|
| Í mió. kr. | 36,8 | 53,4 | 16,6 mió | 45 % |

Henda játtan fevnir um meirútreiðslur til familjur við brekaðum børnum, stuðlar og stovnstilboð til brekað børn. Í játtanini fyri 2006 eru 12,7 mió., sum eru fluttar til kommunurnar í samband við tilboðini til brekað børn í kommunalu dagstovnunum.

Men raðfestingin av brekaðum børnum snýr seg ikki bara um játtanina, men eisini um hvussu vit kunnu fáa eina betri tænastu burtur úr teim upphæddum, sum verða játtaðar. Eitt dømi um hetta er, at við nýggju stuðulsskipanina fyri børn verða møguleikar fyri at stovnseta og samskipa slík

Broytingarnar í stuðulsskipanini eru stórar, og tað er ómetaliga harmiligt at tær í einstøkum førum hava elvt til trupulleikar. Alt verður gjørt fyri at fáa hesi viðurskifti í rættlag sum skjótast. Endamálið er ikki, sum oddagreinin í Sosialinum rør upp undir, at gera umstøðurnar hjá brekaðum børnum verri, men tvørturímóti at geva teimum og teirra familjum eina betri og tryggari tænastu. Tað vóni eg eisini fer at eydnast við góðum samstarvi millum allar avvarandi partar.

## Yvirlýsing:

**Einmælt samtykt á álitisfólkafundi 26.juni 2006**

Álitisfólk felagsins átala harðliga, at kommunalpolitikkarar og fíggjarmálaráðharrin ikki taka størri ábyrgd av sáttmálaøkinum við at vera við til samráðingarnar, serliga við atliti til tær stóru broytingarnar innan dagstovna- og stuðulsøkið.

Nevndin í Føroya Pedagogfelag er okkara politiskt valdu talsmenn.

Vit heita tí á politikkararnar at seta seg til samráðingarborðið beinanvegin.

**Álitisfólk og Nevnd
í Føroya Pedagogfelag**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.